# Sjóvinnubankatátturin

Eitt øgiligt rumbul í Havnini var,
hvørt menniskjabarn var á fótum.
Í gøtunum tyrpast tey aftur og fram
við rópum og ymiskum lótum,
tí Sjóvinnubankin er farin undir kong,
nú vilja tey keypa bæði Tórstein og Long.
*Alt í Føroyum, sum vakurt er og gott,*
*sleppur ikki við í henda tátt.*

2. Á Vaglinum hoyrdust nevaduk
og pístran, blótan og bannan,
har menn gingu óðir og skeldaðu út
og skumpaðu undir hvønn annan.
Teir smátt vildu knúsa tann bankastjór',
sum ýlandi við teirra peningi fór.

3. Í Gongini trokast sum seyður í rætt
ein øgilig mannamúgva,
so Skarvurin brakar og knakar harvið,
er næstan av knóranum skúgvað'.
Men pening at fáa ógjørligt tað er,
tí Holm hevur lænt tað heila, sum er.

4. Á Kongabrúnni teir hildu ting,
har tosar ein havnarmaður;
so hart hann rópti og sá seg íkring,
tað hoyrdist heilt niðan undir Varða:
"Pínadoy, tú hin gamli, tað er ikki rætt,
teir drukku whisky, meðan vit drukku katt."

5. Í Vágsbotni stima teir út og inn,
sum kópar á Dalsfles teir ýla:
"Vit herja á bankan og bróta harinn
og taka tað, vit munnu eiga.
Tá svaraði Ziska: "Nei, gerið ei tað,
í skansan tit koma tann sama dag."

6. Úr Keypmannahavn har komu trí'
teir rokniskapir at granska.
Herr Ekan sa': "Den er gruelig gal,
den strider mod loven den danske.
En halvpart er lånt til en enkelt mand,
bestyrelsens formand, jeg tror min sand.

7. Hvordan dog dette mon falde dem ind,
det er dog ganske ulovligt.
I Dannemark straffer man denslags ting
med bøde, hefte og fængsel."
Men Tórstein svaraði so fyri seg:
"Den lov gælder ikke for Færøerne.

8. Her geri eg lógir, sum her passa til,
sum eg og Herr Holm skulu nýta,
og saman við Kjølbro og Dánjali við
vit oyggjarnar millum oss býta.
Norðeystasta helmingin Kjølbro fekk,
hin vestasti yvir til Dánjalsar gekk.

9. Sum kongar í Havn sita Holm og eg
og ognirnar til okkum raka,
í Suðuroy Dam húsast enn við seg,
har heldur hann seg so spakan."
"Væl eru vit føroyingar serstøk tjóð,
mín góði Tórstein, nú gevast vit fró."

10. Nú Dagblaðið aftur seg dubbar til stríð
og tekur upp goymdar vanar,
og greinar tað skrivar ta heilu tíð
um næsvísar njósnarar danar.
Men blaðstjóri, hoyr hvat teir siga mær:
Tað var ikki dani, sum bankastjóri var.

11. Dagblaðið, tú skuldi skamma teg
at gjørt eina sovorðna gølu.
Tó sømir seg betur, um tit vóru við
at rudda hetta bølið,
sum Sjóvinnubankin er vorðin í dag.
Men tit eru kanska av sama slag?

12. Rista breiðar reimar av annans húð
tað kann hvørt ómenni gera.
Um Dagblaðið heldur, at so er beint,
er einki harvið at gera.
Men hvør setti lívið til fyri tað,
teir oyðslaðu burt bæði nátt og dag?

Tátturin stóð í bløðunum í 1952 ella 1953 og er um, tá ið Sjóvinnubankin fór av knóranum. Her er hann skrivaður av eftir einum leirvíking, sum dugir táttin uttanat. jd